DAGSINS MEINING

Sum ein bumba

Tað kom hálvavega sum ein bumba, tá tað týskvøldið frættist, at P.f. Smyril hevur bjóðað landsstýrinum at keypa eina høvuðsumvælda Norrønu fyri umleið 120 mió.kr. til suðuroyarsiglingina.

Serliga suðuroyingar - men sanniliga eisini mong norðanfjørðs - tóku tilboðið í skemti, men tá tíðindi líkasum sodnaðu, vendu fólk sær ímóti hesum møguleikanum, og í nógvar mátar er tað skilligt.

Í fleiri ár hevur verið talað um at byggja eitt nýtt skip at sigla millum Suðuroynna og Havnina. Skipið er teknað og ein eftirgerð er víst fram á stórum fundi í Suðuroy. Harafturat er skipið skræddaraseymað til hesa sigling.

Henda tanka hava fólk vant seg við. Tí er tað ógvuliga torført at koma aftur umaftur nú við eini aðrari ætlan, hóast hon kanska ber onnur perspektiv fyri hesa farleið í sær. Her verður hugsað um eina farleið umvegis Sandoynna.

Tað kemst ikki uttan um, at allastaðni verður roynt at stytta siglingarleiðir, tí tær eru dýrari í longdini. Harafturat er ómakaleysari at koyra og til ber at koma aftur og fram alt samdøgurið. Tí verða brýr reistar og undirsjóvartunnlar boraðir um firðir og sund.

Valdi samferðslumyndugleikin eina loysn við t.d. Norrønu, so er lítið at ivast í, at farið verð skjótt at fyrireika eina leið um Sandoynna við tunnli undir Skopunarfirði, samferðsluhavn á Sandi og skjóttsiglandi skipi um Suðuroyarfjørð.

Sambært tí stóru samferðslufrágreiðingini frá 1999 er henda farleið leysliga mett at kosta millum 700 og 800 krónur. Taka vit ætlanina við nýggjum skipi nú fer hon óivað upp um 400 mió.kr. Skipið er mett til 300 mió.kr. og havnaløgini til 70 mió.kr.

Her eru tveir møguleikar. So kann skiftast orð um, um tað er rætt at seta teir upp ímóti hvørjumødrum, men møguleikarnir eru til steðar. At tey, sum sigla um Suðuroyarfjørð, vilja hava eitt nýtt og skjóttgangandi skip nú, skilja allir føroyingar, men tað er rætt, sum landsstýrismaðurin sigur, at vit skulu hyggja nøkur ár fram.

Men tað, sum er galið í hesum máli og í allari verkligari útbygging í Føroyum er, at vit viðgera ongatíð av álvara framtíðina, hvørjar og hvar útbyggingar skulu gerast. Okkum vantar heildarætlanir, sum røkka mong ár fram. Ikki bara á samferðsluøkinum, men øðrum økjum við. Samferðslufrágreiðinginvar tó eitt framstig, men tá skuldi orðaskifti verið um, hvør farleið skuldi veljast til Suðuroynna. Norrønu-ætlanin er farin. Nýtt skip verður smíðað. Annað verður ikki góðtikið ídag.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Álaker, bátar og neyst

Tórfinn Smith
býráðslimur

- Neystini skulu burtur og Álakersvík fyllast út, um framtíðarætlaninar hjá Tórshavnar Kommunu halda.

Hetta stóð at lesa í blaðgrein í Dimmalætting herfyri í sambandi við, at friðingarmyndugleikarnir høvdu givið Tórshavnar Kommunu sítt loyvi til at fylla alla Álakersvík út.

Síðani hesa blaðgrein hevur dúgliga verið tosað og gitt um hvørja lagnu Álakersvík fær, og tað er ikki so løgið. Hetta neysta- og smábátaøki, mitt í Havnini, man tala til innaru kenslur hjá mongum, eins og Vágsbotnur og Kongabrúgvin hjá øðrum.

Men enn liggur víkin har, og enn er eingin politisk avgerð tikin um at fylla hana út.

Verandi politiska samtyktin røkkur ikki longur enn til eina minni útfylling eystanfyri í sambandi við eina vinnuliga bygging, og harafturat hevur talan verið um eina vegagerð út eftir eystaru síðu av víkini at lætta um atkomuna til vinnuøkið á Viðarnesi.

Men so eigur eisini at vera nóg mikið. Álakersvík eigur tá at fáa frið, so tað virksemi við smábátum, neystum og tí sum har til hoyrir, verður varðveitt.

Eg eri vælvitandi um tann tørv sum er, og altíð fer at vera, eftir økjum til vinnulig endamál við sjóvarmálan. Men í fyrst lagi fæst bert avmarkaður landvinningur við uppfylling av Álakersvík í mun til tað vit missa á annan hátt, og harnæst skulu vit heldur ikki undirmeta týdningin av góðum umhvørvi og trivnaði.

ST og barnaansing

Heri Joensen
nevndarlimur í foreldrafelagnum í Havn

Sum onkur kanska hevur lagt til merkis, so verður nú flaggað fyri ST 24. oktober. Í oddagreinini 25. oktober vildi sosialurin verða við, at merkið flaggaði á tinghúsvøllinum tann 24. oktober.

Sosialurin heldur at ST ger eitt stórt og týdningarmikið arbeiði fyri at virka fyri eitt nú frælsi, demokrati og mannarættindi og samstundis verja okkum móti stóru multinationalu fyritøkunum og enntá móti privatisering!

Ein kundi kanska spurt um flaggið á tinghúsinum bara er ein symbolsk gerð, ella um Føroya Løgting veruliga vil halda ST sáttmálar og annars vil taka lut í at gera heimin betri fyri øll at liva í. Ella er tað kanska ikki neyðugt at halda sáttmálarnar tí Føroyar ikki er limur í ST ?

Nú sigur oddagreinin einki um flaggið eisini var á stong uttan fyri býráðshúsið í havn, men mín pástandur er, at Tórshavnar Kommuna hevur valt ikki at fylgja eina av týdningarmestu sáttmálunum hjá ST, nevniliga sáttmálin sum skal verja rættindini hjá børnum.

Eg loyvi mær at sitera burtur úr almennu donsku útgávuni av hesum sáttmála (Konventionen om Barnets Rettigheder - vedtaget af FNs generalforsamling den 20/11 1989):

"Artikel 18

1. Deltagerstaterne skal bestræbe sig på at sikre anerkendelse af princippet om, at begge forældre har fælles ansvar for barnets opdragelse og udvikling. Forældrene, eller i givet fald værgen, har hovedansvaret for barnets opdragelse og udvikling. Barnets tarv skal for dem komme i første række.

2. Med henblik på at sikre og fremme de rettigheder, der er indeholdt i denne konvention, skal deltagerstaterne yde passende bistand til forældre og værger ved disses udførelse af deres pligter som opdragere af børn og skal sikre udviklingen af institutioner, ordninger og tjenesteydelser til omsorg for børn.

3. Deltagerstaterne skal træffe alle passende forholdsregler for at sikre, at børn af arbejdende forældre har ret til at nyde godt af omsorgsforanstaltninger for børn, som de er berettigede til."

Sitatið sigur m.a. at myndugleikin skal gara alt fyri at tryggja, at børn, har foreldur eru noydd at arbeiða, hava rætt til ansingarpláss. Myndugleikin sum hevur ábyrgdina av barnaansing (í Havn) er Tórshavnar Kommuna. So um flaggið hevur verið á stong uttan fyri býráðshúsið í Havn tann 24. oktober, má tað hava verið av óvart.

PS: Omanfyristandandi er skrivað tilvitandi um, at nógv børn í heimunum í dag liva undir umstøðum, sum ikku kunnu samanberast við umstøðurnar í Føroyum. Hetta merkir tó ikki at Tórshavnar Kommunu kann fáa undantøku frá at geva føroyskum børnum somu rættindi, sum børn í londum vit vanliga samanbera okkum við.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Búskapur

Trygvi F. Guttesen

Nú hava vit í meira enn trý ár hoyrt frá Tjóðveldisflokkinum, hvussu væl teir hava stýrt búskaparliga við sínum fullveldis landsstýri. Hetta verður endurtikið upp í saman – í Løgtinginum, í fjølmiðlunum og eisini í næstseinasta Fimmara.

Sera avdúkandi og ósmæðið at rópa seg eitt fullveldis landsstýri, tá snøgt sagt púrt einki er komið á mál av teirra ætlanum um fullveldi.

Nei, verandi samgonga og serliga Tjóðveldisflokkurin kann takka ríkiseindini fyri, at okkara samfelag so skjótt reisti seg úr øskuni.

Og hertil kemur nógvur fiskur, góður prísur og lág renta.

Búskaparbroytingin rætta vegin byrjaði í 1994/95 og ikki tá verandi landsstýri tók við!

Men lat okkum nú kanna veruliga búskapin **»í ríkiseindini«** og **»uttan fyri ríkiseindina«**:

Sí talvu!

Hesi tøl frá fíggjarmálastýrinum vísa at landskassans avlop tilsamans í 9 ár eru:
Í ríkiseindini: 2.309 milliard kr. Í AVLOPI!

Í einum fullveldi: 5.603 milliard kr. Í HALLI!

Ein munur uppá: 7.912 milliard kr. uppá 9 ár ella **879 milliard kr. um árið.**

Um vit bert hyggja at einum fullveldis úrslitið í 4 ár – frá 1999 til 2002, har okkara samfelag hevur havt stórt viðrák, ja, so hevur **hallið tilsamans verið kr. 1.580.000.000,-.**

Í ríkiseindini:

Avlop í:	1994	1995	1996	1997	1998	1999	2000	2001	2002
mió. kr.:	**÷391**	**8**	**67**	**177**	**470**	**603**	**603**	**613**	**159**

Uttan fyri ríkiseindina – í einum fullveldi:

Avlop í:	1994	1995	1996	1997	1998	1999	2000	2001	2002
mió. kr.:	**÷1.208**	**÷844**	**÷800**	**÷721**	**÷450**	**÷342**	**÷370**	**÷385**	**÷483**

Gott var at vera í Skálakøsti

Frits Johannesen

Lítla hvíta hønan sat undir liðini á tí amerikanska hananum. Hann var so amerikanskur og erpaði sær av Ameriku. Lítla, fitta, hvíta Skálahønan visti alt um Skálakøst, og fingu hønurnar okkurt forkunnugt, segði hon altíð: "Lukka, hetta er einki aftur móti tí, vit vóru von at finna í Skálakøsti."

Á ja, hetta er í ævintýrinum hjá Hans A. Djurhuus: Høsnatos. Eitt sera vælskrivað ævintýr, hvussu leikur fer fram, táið ein heldur meir um seg sjálvan, enn onnur. Sandingurin segði: Hugmóð betaki teg! Hanin var eitt sindur hugmóðigur, og fekk hann ein syndarligan enda. Hann var so amerikanskur, so erpin og stoltur og virdi lítið tað, sum Skálahønan visti um at siga. Snøgt sagt, var hon happað av hananum meira enn gott var, og lá hon undir hansara ágangi bæði likamliga og sálarliga - tíðliga og seint. Hann kom frá tí stóra hveitilandinum, og tað var sanniliga stórfingnari enn tað, sum var at finna í Skálakøsti. Men oftani stendur hugmóð til fals, og svá var. Hetta kom at standa oman á hanan. Hann misti høvdið, meðan skálahønan eftir deyða hansara fekk almikið av korni frá húsfrúnni og arbeiðskonuni. Eftir hesa gongd hevði lítla, fitta hvíta hønan lív og góðar dagar.

Nú er leikur her á landi tann, at tala og umrøtt verður mikið um at leggja kommunur saman. Sjónvarpið hevur fingið hetta í blóðið, og rennur úr bygd og í bý, at vita hvat bý- og bygdaráðsformeninir hava at siga - hvat teimum liggur á hjarta, táið hugsað verður um hesi viðurskifti. Umboðini eru ymisk á máli. Ein er áskoðanin tann, at leggur tú saman kommunur fæst meira fyri minni, meðan hin drátturin er , at summar kommunur vilja vera sjálvstøðugar og tala sína søk á hesum støði og taka samráðingar upp við t. d. grannakommunurnar um samarbeiði og samstarv á jøvnum føti.

Skálahønan var so erpin av sínum heimliga umhvørvi, at hon ikki vildi hoyra tala um nakað annað. Hetta var so inngrógvið, at ikki glasiliga frásøgnin frá hananum um landið, har pikkað varð hveiti frá sólarrisi til sólseturs, rann við hana, hóast hon fekk at vita, at hon var ein krimpirumpa, rekavætti og matkakjós. Einki var sum Amerika, og har var alt so fínt, so fínt, greiddi hanin frá. Hanin fekk ikki bilbugt við hesa fittu, erpnu, sjálvstøðugu hønuna. Hon var ímyndin av treiskni, viðføddum evnum at klára seg, førdi seg fram, sum ein rødt bygdahøna við einum lívsvilja, at vinna á øllum trupulleikum, hóast hon kendi sviðan frá tí sterka andbráða, stolta og maktsjúka hananum.

Hví skuldi hon víkja frá sínum dreymum um sítt ríki og geva seg undir ein dumstoltan hana, sum bert vildi hava hennara hjarta og mana alt til jarðar, sum hon hevði fingið heimaníf rá og fáa hana at vera ein av sínum undir-sáttum? Tað samarbeiðið, sum fór at spyrjast burtur úr hesi søk var, at tann sterki, maktfulli hanin og tað "stóra ríki" fór at køva tann neista, sum var at finna í kjósini hjá hesi yndisligu, fittu skálahønuni og hvørva fór med alla hennara heimfødisliga mynd av Skálakøsti.

Nei, dreymurin um alt tað góða í Skálakøsti, skuldi eingin taka frá henni. Hon var eitt sera gott umboð fyri hetta høsnaríki, eitt kosmopolitiskt hønuhjarta, sum bankaði fyri tí, sum var heimligt og so sera bygdasligt. Hennara barndómsríkið var lítið í vav, men tað var stórt í hennara hjarta. Soleiðis eigur tað at verða.

Eg vildi ynskt, at øll skálafólk og øll bygdafólk vóru sum henda hønan. Annars takka vit fyri ta tíð, har skálafólk hava verið skálafólk í Skálakøsti.

Vinnuhúsið í víggi

Hans Pauli Strøm
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Arbeiðsgevarar halda, at teir sjálvir eru teir bestu til "at skipa loysnir, sum tryggja eina virknaðbrúkaravernd", og tí halda teir ikki tað er neyðugt viðslíkum nýggjum brúkarapolitiskum tiltøkum, sum Javnaðarflokkurin mælir til.

Javnaðarflokkurin hevur gjørt eitt fullfíggjað álit um brúkarapolitikk og brúkarastovn. Í hesum áliti eru eisini uppskot til eina lóg um marknaðarføring og eina lóg um brúkarakærunevnd. Álitið varð sent til hoyringar og ummælis fyri knøppum mánaði síðani til viðkomandi partar, myndugleikar og áhugabólkar. Meiningin er nú at meta um innkomnu svarini, og út frá tí møguliga gera rættingar ella broytingar ílógaruppskotunum, áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið.

Javnaðarflokkurin sendi m.a. eisini Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkaraálitiðtil ummælis. Men samstundis sum vit fáa svarið aftur frá Arbeiðsgevarafelagnum, hava teir kunngjørt svarið á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum. Og brot úr hesum verða endurgivin í fjølmiðlunum, har tað ístuttum verður borið fram, at Arbeiðsgevarafelagið kolldømir brúkaraálitið hjá Javnaðarflokkinum, tí at teir halda at tey vinnurekandi sjálvi eru tey bestu til at veita brúkarunum ta tryggastu brúkaraverndina !!! Og tí er ikki neyðugt við nøkrum almennum brúkarapolitikki ella brúkarastovni ella nýggjari brúkaralóggávu.

Nú má Arbeiðsgevarafelagið halda okkum til góðar, tí vit fara ikki í eitt orðaskifti við Arbeiðsgevarafelagið enn " ikki fyrr enn vit hava viðgjørt øll tey innkomnu svarini " ikki fyrr enn vit hava gjørt møguligar broytingar í lógaruppskotunum " og ikki fyrr enn tey eru løgd fyri løgtingið til viðgerðar og støðutakan.

Tó vil eg endurgeva nøkur brot úr innganinum í álitunum, sum kunnu verða hóskandi í hesum sambandi:

"Brúkaraáhugamál í okkara brúkarasamfelag eru av so stórum samfelagsligum týdningi og raka okkum øll og alt tilfeingi okkara, at hesi mál ikki kunnu røkjast bert á privatum grundarlagi, men at politisk ábyrgd eisini eigur at verða á hesum øki..."

"Ein aktivur brúkarapolitikkur er ein politikkur sum veitir brúkaranum tað neyðugu kunningina styrkir tann einstaka brúkaran á marknaðinum fremur krøv brúkarans og tryggjar, at brúkarin kennir sín rætt mótvegis vinnuni, og hvussu hesin rættur verður framdur í verki".

Til hetta endamálið halda vit tað er neyðugt við uppskoti okkara um ein brúkarastovn, lóg um marknaðarføring og lóg um brúkarakærunevnd.

Til landstýrið, løgtingsmenn, Strandferðsluna og fjølmiðlar.

Suðringar mótmæla

Finnleif Guttesen
Jógvan Kroslág
Heri Hjelm
Viberg Simonsen

Mótmælisskriv frá teimun útblakaðu limunum í Smyrla nevndini.

Í tíðindunum í gjár frættist, at Vinumálastýrið hevði fingið tilboð frá Smyril Line um at keypa NØRRØNU fyri 115 til 130 mill. til Suðuroyarsiglingina.

Vit undirritaðu limir í fyrrverandi nevdini til bygging av nýggja Smyril vilja hervið harliga átala, at tað so mikið sum kemur uppá tal at keypa eitt 30 ára gamlt skip til siglingina millum Suðuroynna og Havnina.

Vit kenna NØRRUNU og hon er totalt óegna til siglingina,tí hon er ring at sigla við ímóti-tá verður bert trampan við 10-12 míla ferð- og hartil er hon høg og tí ring at leggja at við í vindi. Avlýsingar/seinkingar verða uttan iva á vetrardegi, sum vit ikki kunna hava á ogra landsvegi, tí skipið er ikki egnað.

Stjórin á SMYRIL LINE hevur sagt, at NØRRUNA er niðurslitin og tí er neyðugt at byggja nýtt skip.

Ein slík niðurgering av okkum suðringum kunnu vit ikki góðtaka og at vinnumálaráðharrin eftir øllum at døma gongur inn fyri slíkari ætlan vísur hvussu inkompetentur hann og rágevarar hansara mugu vera.

Nú hoyrast so eisini røddir úr Sjálvstýrisflokkin um tað ikki er betur við einari bílagari loysn á Suðuroyarleiðini fyri at kunna brúka einar 200 til 300 milliónir meira norðan fyri- hetta kemur ikki óvantað á , tað vóru jú teir sum á sinni lorkaðu TEISTAN burtur.

Sum sagt omanfyri verður ikki talan um at vit suðringar ganga við til, at ein 30 ára gomul danga (plimsollara) fyri 130 mill. krónur skal røkja suðuroyarleiðina. Sum dømi um plimsollara kann nevnast javnaldurin SMYRIL sum tvær ferðir seinastu 14 dagarar hevur verði í dok tí hol hevur verði á skipium.

Einasta og besta loysnin er tann sum landsstýrismaðurin legði fram 6. oktober 2001 í Øravík fyri øllum suðringum, har hann gav lyfti um, at kjølurin skuldi strekkjast á várði 2002 og skipi klárt at seta í sigling í 2004.